Friggjadagur

# Dimmalætting

Nr. 167 • 118. árgangur • 3. november 1995 • Tlf. 11212 • Fax 10941

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

7 kr.

»Úr Luftini« við SV- og ÚF-skránni Í BLAÐNUM Í DAG

# Fáa alt uttan bankaskuld

**Samráðingarnar:** – Tað einasta, sum er eftir at loysa, er bankaskuldin, segði Edmund Joensen, løgmaður í gjár. Í dag kl. 11 føroyska tíð byrja samráðingarnar í Fíggjarmálaráðnum.

DIA MIÐJORÐ

(KEYPMANNAHAVN) Í gjár kom føroyska samráðingarnevndin til Danmarkar við flogfari.

Eftir eina nátt á hotelli, verður lagt til brots nú í morgun kl. 11 føroyska tíð. Og føroyingarnir eru heldur bjartskygdari, enn tað hevur ljóðað.

Løgmaður sigur, at fundirnir á embætismannastig hava loyst teir flestu trupulleikarnar.

Sambært løgmanni hava embætismenninir fingið nógv burturúr, og føroyingar fáa meginpartin av tí ígjøgnum, sum stendur í upplegginum.

– Tað einasta, sum er eftir, er bankaskuldin, segði Edmund Joensen, løgmaður, við Dimmalætting í gjár.

Við hesum verður óbeinleiðis sagt, at rentuskáin ikki er nakar trupulleiki.

Annars segði løgmaður seg vera ógvuliga spentan til samráðingarnar.

Eisini landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, var bjartskygdur, tá Dimmalætting skifti orð við hann í gjár.

– Eg rokni ikki við, at vit koma aftur sum av torvheiðum, segði Jóannes Eidesgaard.

– Alt er tengt at, hvussu kortini verða spæld. Hesaferð er dokumentatiónin nógva ferðir betri enn undanfarnu ferðir, og vit hava havt betri tíð at leggja eina strategi, sigur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum.

Hann væntar ein skjótan fund í Keypmannahavn.

– Eg ætli mær heimaftur í morgin, segði hann í gjár.

Løgmaður segði við Dimmalætting herfyri, at tveir tímar var ríkiligt at samráðast í.

Hetta heldur hann fast við, og sigur orsøkina vera, at embætismenninir hava loyst so nógvar trupulleikar.

Tann einasti stríðsspurningurin kann gerast bankaskuldin. Hon er donsk sambært løgmanni.




*Tað handlar um olju og pengar, nú føroyingar og bretar samráðast um markið. Við fiskimarkinum hava ikki verið størvegis trupulleikar, men nú olja tykist vera í undirgrundini, royna bretar at troðka seg inn um fiskimarkið, og brúkar nøkur heilt onnur prinsippir. Men ein loysn er í eygsjón, og Árni Olafsson, formaður í føroysk/donsku samráðingarnevndini, væntar eitt úrslit áðrenn árið er liðið.*

# Oljan í miðjuni

**Marknaðtrætan:** Í hesum døgum tingast Føroyar og Bretland um markið millum londini bæði. Vit hava viðgjørt evnið í eini drúgvari og neyvari grein inni í blaðnum í dag.

PÓL Á KLETTI

Fyrst í sjeytiárunum fluttu strandalond fiskimarkið út á 200 fjórðingar.

Á leiðum millum lond, ið vóru styttri enn 400 fjórðingar, skuldi miðlinjan vera mark.

Miðlinjan millum Føroyar og Bretland er ongantíð endaliga ásett, tí semja er ikki um, hvar linjan skal setast.

Føroyingar halda seg til miðlinjuprinsippið, út frá okkara beinu grundlinjum.

Í dag umskarast tann, sum bretar krevja og tann, sum føroyingar krevja, við eini gráari leið ímillum.

Bretar siga seg hava mark longur norður á føroyska landgrunnin.

Men hvat er í veruleikanum eitt mark á sjónum?

Hvussu hava hesi mark gjøgnum tíðirnar verið sett og hvussu hava tey verið vird.

Hesum greiðir føroyski serfrøðingurin í havrættarmálum, vágbingurin Dánjal Nolsøe, frá í blaðnum í dag.

Meðan tað áður bert var talan um fiskatilfeingi í tí havøki, fiskimarkið fevndi um, er talan nú um ráevni í undirgrundini. Og oljan er dýr!

Helena Dam á Neystabø er formaður í uttanlandsnevndini, og hon krevur, at føroyingar seta eina »dead-line«, ella seinastu freist, so skal málið vera loyst, ella sendast til dómstólin í Haag.

Hesum er leiðarin í føroysk/donsku sendinevndini, Árni Olafsson, ikki samdur við henni í.

– Tað er ikki rætt at seta ein »dead-line« bara fyri »dead-line« skuld – við teirri risiko, at ein so knappliga uppdagar, at ein kortini ikki gav sær nóg góðar stundir til at finna loysnina. Men sjálvur dugi eg ikki at siggja annað enn, at tað verður beint fyri nýggjár ella beint aftaná, at greiði er fingin á, um egg ella ungi spyrjast burturúr verandi tingingum, sigur Árni Olafsson.

Tað hevur eisini verið ávíst stríð um, hvørt føroysk/danska sendinevndin hevur slept miðlinjuprinsippinum.

Til hetta sigur Árni Olafsson, at tað matematiskt eru óendaliga nógvar útgávur av miðlinjuni.

– Men vit hava ikki í marknaðarsamráðingunum givið bretum nakra tilsøgn um at sleppa okkara miðlinjuprinsippi, sigur hann.

Kemur eingin semja, endar málið í Haag.

Edmund Joensen, løgmaður er ikki bangin fyri einum dómi har.

– Føroyingar hava so haldgóðar grundir fyri sínum sjónarmiðum í miðlinjuspurninginum, at politiski myndugleikin eigur ikki at óttast, um málið kemur til Haag, sigur hann.

**Lesið meira á síðu 8**

## Í BLAÐNUM Í DAG



### Sannleikans tveir tímar

Danska stjórnin kann ikki senda teir báðar heimastýrisflokkarnar Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin heim við ongum eftir fundin í Keypmannahavn í dag. »Hendir tað, tekur danska stjórnin beinini undan teimum,« sigur Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur.

**Síða 3**

### Ársins songrødd aftur á skránni

Í kvøld verður fyrsta umfarið av ársins songrødd í Gundadalshøllini. Hetta tiltakið var fyri 12 árum síðan ein tradition innan føroyskt tónleikaundirhald. Páll Arge, sum hevur verið ein av oddamonnunum aftan fyri hetta tiltak, sigur, at ætlanin er at fara kring allar oyggjarnar við tiltakinum.

**Síða 5**

### Óli Johannesen frá TB til GÍ

Gøtumenn royna í hesum døgum at finna sær venjara, og helst kemur danin Poul Erik Christensen frá AaB til Gøtu hetta vikuskiftið at kanna umstøðurnar. Hinvegin hevur GÍ styrkt sær um spælarahópin, tí nú er greitt, at TB-arin Óli Johannesen næsta ár spælir við GÍ.

**Síða 6**

### Ótrúlig stuðulskonsert í Gundadalshøllini

Stuðulskonsertin hjá Norðurlandahúsinum í høllini á Hálsi týskvøldið til frama fyri tey vanlukkuraktu á Flateyri eydnaðist ótrúliga væl. Tilsamans komu inn 1,3 mió. kr. Havandi í huga, at hetta tiltak varði hálvanfimta tíma, er hetta órúliga nógv; næstan fimm túsund krónur um minuttin.

**Síða 2**

### Svii vann norðurlendska náttúruvirðisløn

Nýgja náttúru- og umhvørvisvirðislønin hjá Norðurlandaráðnum uppá 350.000 kr. verður í ár latin svenska lívfrøðinginum, granskaranum og rithøvundanum Torleif Ingelög, sum er leiðari av ArtDatabankanum á svenska landbúnaðaruniversitetinum.

**Síða 5**

## Ráðgevandi nevndin komin við frágreiðing

Júst sum samráðingarnar skulu fara í gongd, er Ráðgevandi Nevndin komin við enn eini frágreiðing. Hon kom gjáramorgunin kl. 9.

Í frágreiðingini mælir nevndin frá at broyta m.a. kvotaskipanina og heldur gera hana meira umsetiliga.

Um skattin verður sagt, at hann bert kann minkast, um skorið verður enn meira innan fyri almenna sektorin. Og tað ber væl til, sambært donsku serfrøðingunum.

## Kommunuavtalan endaliga avgreidd

Fyrradagin skrivaðu føroysku lánsveitararnir undir avtaluna, sum skal lætta um hjá kommununum.

Tann 27. oktober skrivaðu teir útlendsku lánsveitararnir undir avtaluna. Tað vóru tó tveir lánsveitarar, sum stóðu uttanfyri avtaluna.

Avtalan, ið fevnir um eina samlaða skuld upp á umleið tvær milliardir krónur ber í sær ein munandi rentulætta, umframt ein avdráttarskáa í fimm ár.

## Nógv bíligari haruhagar



**Haruskjóting:** Í gjár byrjaði harutíðin, og til og við 31. desember er loyvt at skjóta haru í Føroyum.

EMIL L. JACOBSEN

Jógvan Sigurd Poulsen, sum røkir Neshaga í Vestmanna, sigur, at prísirnir á haruhagum eru minkaðir nógv seinastu árini.

– Neshagi fór fyri 7.100 krónur í ár. Í fjør kostaði hann 10.000 krónur, og onnur ár hevur prísurin verið uppi á eini 17.000 krónum.

Jógvan Sigurd Poulsen dugir ikki at siga, hví prísirnir eru so lágir.

– Kanska er tað tí, tað eru teir somu, sum bjóða uppá sama hagan hvørt ár, og hinir respektera tað. Tað er sjáldan, at nakar bjóðar ímóti, sigur hann.

Jógvan Sigurd Poulsen heldur eisini, at tað, at fólk hava minni pening um hendi, hevur havt við sær, at prísirnir minka.

– Okkurt árið fór ein hagi, sum kallast Úti á Bjørgum, fyri 17.-18.000 krónur, og í ár fór hann fyri 4.800 krónur, sigur Jógvan Sigurd Poulsen.

**Prentlutir**

✔ Skjóta avgreiðslu
✔ Kappingarføran prís



*Ring tlf. 11212*

Dimmalætting

FARVE